oyggj er doyptur seinni.

Tann 16. apríl fór eg út í Hest, har nøkur fá trúgvandi hava verið í fleiri ár og onnur eru komin afturat seinni. Fólkið gav ikki møtinum nógv gætur, men tey kristnu tystu eftir orðinum.

*Hvalba var eitt av teimum plássum, gamli Sloan vitjaði longi í 1866. Her kom so eisini ein samkoma, kallað Vitnið.*

## Gleðin við lýdni

*13. desember 1908*

Br. Cook kom úr Íslandi og var saman við okkum einar 14 dagar. Vit høvdu eina góða tíð saman og høvdu serlig møtir í Havn. Harrin hevur útvegað mær eitt gott ljósmyndatól við evangeliskum myndum, donskum sangum og nógvum teksti. Eg havi havt nøkur serlig møti við hesi útgerð, har eg havi prædikað evangeliið. Tað kom ein hópur av fólki at síggja og hoyra, og nógv av teimum eru seinni komin til tey vanligu evangelisku møtini.

Seinasta mánakvøld hevði eg ta gleði at doypa tveir brøður úr Sørvági, har nakrir fáir, sum teir fyrstu vóru umvendir seinasta vetur. Nú ein dagin tosaði eg í telefon við ein annan bróður, sum ynskti at verða doyptur. Tað er hjartanemandi at síggja gleðina hjá hesum aftaná, vitandi at tey hava gjørt Guds vilja. Um Harrin bíðar, vænti eg stór ting at henda í komandi døgum. Nógvar dyr vilja lata seg upp fyri boðskapinum. Í fleiri plássum, har eingin arbeiðari hevur verið í eini 12 ár, havi eg nú trygd fyri at fáa høli. Tær smáu samkomurnar mugu eisini verða vitjaðar.

## Framvegis framgongd

*Í 1909 skrivar Echoes of Service:*

Harra Danielsen heldur áfram við síni tænastu at vitja tær ymisku bygdirnar at halda møti, og ein vinur hevur gjørt so væl at senda okkum avrit av brævi, hann fyri kortum hevur fingið frá honum.

Tann lítli bólkurin av trúgvandi á Viðareiði hevur verið darvaður av ov lítlum plássi at halda møti í. Men her er komin ein loysn, og á fyrsta møtinum var fult til dyrnar, og tað var stórur áhugi. Summi spurdu eisini um vegin til lívið.

Í Svínoy var ein stór roykstova í einum bóndahúsum so full, at talarin illa slapp inn, og nógvar bíbliur vóru bílagdar. Á Kirkju vóru ein ung hjún sum frøddust í Harranum. Tey vóru umvend á einum møti árið undan í Havn, tá tey vóru í Havn at siggja kongin. (Tað var kongavitjan í 1907). Tey hava nú eitt litið barn, sum teirra grannar kalla ein lítlan heidning, tí tað er ikki "kristnað". Her vóru eisini góð møtir.

Eina ferð frammanundan doypti Danielsen leiðandi bróðurin í lítlu samkomuni í Porkeri og eisini konu hansara. Hon var tó so veik, at hon mátti leiðast niður í vatnið, men hon segði aftaná: "Nú eri eg lukkulig. Mær hevði ikki dámað at sæð Harran Jesus andlit til andlit ódoypt, tí eg havi sæð hetta so leingi og havi ikki aktað. Nú kann eg doyggja í friði, nær so Harrin vil at tað skal vera."

Í einum øðrum plássi doyði barnið hjá einum trúgvandi og ein andakt varð hildin í kirkjugarðinum. Tað er ein nýggj lóg sum loyvir hesum. Frammanundan kundi hetta bert vera gjørt uttanfyri kirkjugarðin, og tá plagdu fólk at siga, at okkara brøður jarðaðu teirra deyðu "sum hundar". Henda broyting er eitt bønarsvar.

*Loysnin á hølisviðurskiftunum á Viðareiði var, at Lina, kona Daniel, arvaði eini hús, sum vórðu nýtt til endamálið.*

*Taka vit hinar bygdirnar, hann nevnir, kann nevnast, at í Svínoy hevur verið ein virkin samkoma, har Malla og Edvard Jacobsen spældu ein stóran leiklut. Har er eisini salur. Tað er tað eisini á Kirkju.*



*Hetta er framleiðsluhøli hjá gummiídnaðinum í Congo*

## Ein broyting frá gomlum døgum

*25. juni 1910*

Síðan eg kom aftur úr Skotlandi havi eg verið í Eysturoynni, har eg vitjaði í trimum bygdum við evangeliinum. Móttøkan var ymisk. Í nøkrum fáum húsum møtti ein andlitum hørð sum marmor, og tey hugdu, sum um tey hildu, at tey kundu gjøgnumfrysta ein. Men eitt vinarligt orð kann ofta broyta hetta andlitsbrá, so vit kunnu leggja eftir okkum eina traktat, og ofta er móttøkan betri næstu ferð. Í øðrum heimum vórðu vit boðin at seta okkum niður. Í øðrum vórðu vit sera vælkomin, og fólk løgdu arbeiðið niður og lurtaðu við andakt. Ofta komu fólk úr grannahúsinum at lurta, og vit høvdu eitt álvarsamt møti í roykstovuni.

Nakað herfyri kom eg aftur úr Sørvági, har tey trúgvandi vóru fegin um at síggja meg, og vit høvdu eina signaða tíð við felagsskapi. Eg hevði nøkur møti og vitjaði í 40 húsum, og yvirhøvur var eg væl móttikin. Nakrar dagar, áðrenn eg kom, var ein systir doypt og fór síðan til Íslands at arbeiða. Henda unga kvinnan varð umvend á okkara seinastu vitjan, beint áðrenn vit fóru til Skotland.

Um nakrar fáar dagar vóni eg at fara í Norðoyggjar og at kunna taka mína kæru konu við at hjálpa mær í arbeiðinum. Sum tit vita er ein lítil salur á Viðareiði, men hann er ov lítil til evangelisk møtir. Mong mugu standa uttanfyri, serliga um veturin. Hetta var eitt íbúðarhús, sum er broytt. Vit fingu ikki loyvi til at byggja nýggjan sal á grundina. Men nú hevur Harrin náðiliga opnað ein veg á ein undarfullan hátt. Eg havi fingið loyvi frá myndugleikunum at byggja ein sal á eini grund mitt í bygdini á einum sera vælegnaðum plássi.

Tað eru nøkur trúgvandi á Viðareiði. Eingin av teimum er enn doyptur, men tvær familjur hava brotið við gamlan sið og ynskja at fylgja Harranum samb. hansara orðum eina. Ein av hesum hevur nevnt eina upphædd, sum hann og konan hava avgjørt at lata til salin.

Fólkið her er vanliga fátækt, men onnur hava lovað at hjálpa til, og sølan av gamla salinum fer eisini at hjálpa til. Hetta verður fjórði salur bygdur í Føroyum innan fyri fimm ár, og brøður í Suðuroy hava eisini ætlan um at byggja ein nýggjan sal. Bert fyri nøkrum fáum árum síðani kundu tú ganga gjøgnum hesar bygdir uttan at finna kristnan felagsskap og uttan at møta einum vinarligum eygnabrái ella smíli, um tú var í Meistarans ørindi. Tað er vissuliga ein stór broyting. Tú fært eina hjartaliga vælkomu og kann njóta kristnan kærleika og kann í einum fittum lítlum sali møta nøkrum monnum og kvinnum, hvørs andlit er upplýst av gleði og heilagum kæti.

*Samb. "Men Gud gav vøkst" hjá Sigurd Berghamar eru fyrsti viðingar doyptir í Havn í 1907, 1908 ella 1909. Men eftir hesum at døma kann tað ikki hava verið fyrr enn í 1910.*



*Ein partur av virkseminum hjá trúboðarunum hjá Balolo missiónini var eisini at útvega fólkinum betri húsaumstøður. Hetta eru hús, sum eru bygd av umvendum innføddum undir vegleiðing av trúboðarum. Henda mynd saman við myndunum úr Congo í seinasta parti er úr bókini King Leopold´s Rule in Africa hjá Edmund Morel, sum kom út í 1904*

## Tannlæknahjálp sum missión

*Her er ein stubbi, sum Arthur Brend skrivaði í sama blað, og sum eisini lýsir umstøðurnar í Føroyum tá. Danielsen og Brend, sum annars var tannlækni, munnu hava arbeitt saman. Í hvussu er fóru teir í 1915 í felag at geva út blaðið Naade og Sandhed.*

*Brend skrivar:*

Síðan mína ferð til Fuglafjarðar, havi eg verið á trimum øðrum ferðum. Tann seinasta var til Eiðis, haðani eg kom leygardagin. Eg var ovfarin av, hvussu nógv fólk vóru á hesum møtum, har áður nóg illa eitt dusin (12) fólk komu. Helst hevur tannlækna- og heilivágshjálpin, sum eg var førur fyri at geva, gjørt ein mun. Eg havi givið yvir 60 fólkum viðgerð. Tá eg kom aftur, mátti eg gista í Hvalvík. Men tá eg ikki kundi fáa innivist har, mátti eg gista í einum neysti. Her mátti eg hoppa fyri at halda meg heitan. Tá eg fór haðani næsta morgun, var ein handilsmaður, sum bjóðaði mær inn, og hann gav mær okkurt at eta saman við heitum kaffi. Eg hjálpti eisini nøkrum sjúklingum, inntil rutubáturin (helst Ruth) kom. Nú vóru øll so forharmað um, at eg ikki hevði havt frægari innivist enn hetta.

Várið er vanliga ein góð fiskitíð, men veðrið hevur tarnað nógv, og 22 mans eru druknaðir í illveðrinum bert í mars.

*10. mars gongur Norðstjørnan av Tvøroyri burtur á Føroya Banka við 11 monnum. 12. mars gongur bátur úr Klaksvík burtur við 6 monnum. Hetta er tað vit vita um.*

## 30 møtir á Viðareiði

*30. januar 1911*

Eg sendi nakrar reglur fyri at prísa Guds fólki, sum í áravís hava biðið fyri hansara verki á hesum einsamøllu oyggjum. Um miðjan desember fóru konan og eg til Viðareiðis, har tað búgva 300 fólk. Her er ein nýggjur salur júst bygdur. Vit byrjaðu eina møtirøð eftir nøkur kvøld við bøn. Eg hevði 30 evangelisk møti umframt onnur møti bert fyri Guds børn. Í summum heimum vóru vit eisini biðin um at hava møti eftir, at vit høvdu fingið ein góðan temunn. Salurin varð viðhvørt yvirfyltur, og ikki havi eg fyrr havt so signaða tíð her. Eitt kvøld reistu fimm seg upp, hvør eftir annan, og vitnaðu um nýfunnu frelsuna. Á hesum møtum vóru tað níggju, sum vitnaðu opið um sína umvending. Nógvar bíbliur eru seldar og mong rannsaka skriftirnar.

## Meting av arbeiðinum í summar

*11. september 1911*

Nú er summarið farið at halla, og vit eru Gudi takksom fyri hansara varðveitslu og fyri, at hann hevur opnað nógvar vegir at røkka mongum plássum við evangelinum. Í summar var ikki stór luttøka á innandura møtum. Tað var øðrvísi við møtum uttandura, og fólk steðga upp og lurta í longri ella stytri tíð. Hetta gevur okkum møguleika at røkka mong,